UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **12. september 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-23**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-029/2021 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingskvinnu, eftir § 52a í Tingskipanini, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni. Um fólkaskúlalógina.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu líður við arbeiðinum at endurskoða fólkaskúlalógina ?
2. Nær ætlar landsstýrismaðurin at leggja uppskot fyri Løgtingið við endurskoðaðari fólkaskúlalóg?

Svar

Til 1: Arbeiðið at endurskoða fólkaskúlalógina er fyrireikað og lýst. Fólkskúlaráðið hevur eftir áheitan frá landsstýrismanninum gjørt tilmæli í málinum, og er hoyringarfundur ásettur at verða. Síðani verður arbeiðsbólkur settur at viðgera ætlaðu broytingarnar.

Til 2: Ætlanin er at leggja uppskot um broytingar fyri Løgtingið á vári 2022, um allar ætlaðu broytingar verða tiknar við, veldst um, hvussu umfatandi tilmælið verður, og um allar broytingar kunnu verða gjørdar samstundis.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður